

# Atlantic Petroleum lítið avlop fyri rentur og skatt 4. ársfjórðing

**Jan Müller**

17.03.2014 - 21:40

Oljan.fo

Atlantic Petroleum almannakunngjørdi fríggjadagin úrslitið fyri 4. ársfjórðing og ársroknskapin fyri 2013. Sølan í 4. ársfjórðingi var 90 mió. kr., og úrslit fyri rentur og skatt var 1,3 mió. kr. Úrslit eftir skatt er eitt hall, sum var 1,6 mió. kr. Eginognin hjá felagnum var við ársenda 597,3 mio. kr. Gjaldførið var 184,6 mio. kr.

Farna árið var hendingarríkt ár fyri felagið, í desember varð felagið skrásett á Oslo Børs og í hesum sambandi framdi felagið eina kapitalhækking. Felagið var við í trimum loyvisumførum í árinum og fekk tillutað  8 loyvi í 22. loyvisumfari og APA umfari í Norra og 27. loyvisumfari í Bretlandi.

2014 verður somuleiðis hendingarríkt við 4 leitibrunnum. Tann fyrsti brunnurin Langlitinden varð boraður í februar, og har var funnið kolvetni í munandi nøgdum, og kanningar verða gjørdar av hesum fundinum.

Næsti brunnur verður Brugdan 2 í Føroyum og síðani Pegasus í sunnari parti av Norðsjónum, bretsku megin, og Ivory, í norska havinum.

Orlando framleiðslumiðið verður nú av álvara útbygt. Henda framleiðslan fer at geva felagnum 2.500 tunnur av kolvetni um dagin.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum legði fram úrslitið og framtíðarætlaninar hjá felagnum fríggjadagin. . Til ber at síggja og hoyra framløguna við at trýsta á leinkjuna:

http://www.petroleum.fo/Default.aspx?pageid=17799